TING-HELLAN

# Bush boygdi seg fyri høgravonginum

**Amerikanski forsetin útnevndi fyri stuttum ein nýggjan dómara til hægstarætt. Samuel Alito er nýggi maðurin, sum høgravongurin tekur ímóti við opnum ørmum, meðan demokratarnir og aðrir liberalir felagsskapir óttast tær avleiðingar, hetta valið fer at hava fyri samansetingina í hægstarætti**

HÆGSTIRÆTTUR Í USA
*Stefan í Skorini*

Tá hægstarættardómarin Sandra Day O´Connor boðaði frá, at hon fór at leggja frá sær, gav hetta George Bush ein gyltan møguleika at seta síni fingramerki á landsins hægstu juridisku institutión. O´Connor hevur verið tungan á vágskálini í fleiri týðandi málum, ið hægstirættur hevur tikið støðu til, tey 24 árini hon hevur sitið sum dómari. Hon varð mett at vera lutfalsliga hóvlig, og tí var hennara atkvøða ofta avgerandi fyri, hvønn veg avgerðirnar hjá rættinum koppaðu.

Um Bush nú kann útnevna ein dómara, hvørs støðutakan fer at ganga ynskjunum hjá baklandi forsetans á møti, hevur hann samstundis koppað javnvágini í rættinum. Forsetin royndi seg fyrst við Harriet Miers, ið møguliga var tann hóvligа loysnin, men tá hon tók seg aftur eftir harðar atfinningar frá republikanarum, valdi Bush at tilnevna Alito.

### Svorðin republikanari

Eingin ivi er um, at Bush við hesum valinum hevur boygt seg fyri teimum meira víðgongdu konservativu kreftunum í flokkinum, og hann hevur valt ein dómara, ið er meira høgrasinnaður í traditionellari merking enn O´Connor.

So skjótt sum Bush hevði kunngjørt navnið hjá Samuel Alito, fegnaðist tann harða kjarnan av teimum konservativu í USA, meðan vinstravongurin rópti neyðarróp og ávaraði um, at Alito var ein beinleiðis hóttan ímóti teimum virðum, ið demokratar vanliga eru forsprákarar fyri.

Báðumegin á politiska vígvøllinum eru áhugafelagsskapir tilreiðar at brúka milliónir av dollarum í stríðnum um hesa tilnevningina, og fleiri eygleiðarar spáa, at stríðið verður bæði hart og blóðugt.

Fyri stuttum vóru fleiri skjøl almannakunngjørd í Washington Post, og tey avdúka, hvørja støðu Alito hevur til fleiri av teimum málunum, ið liggja fremst í huganum hjá áhugabólkunum, ið fylgja við tilnevningini.

Eitt av teimum áhugaverdu skjølunum er ein umsókn frá 1985, tá Samuel Alito søkti starv í umsitingini hjá Ronald Reagan.

Í umsóknini sigur Alito, at hann er svorðin republikanari, og at hann so at siga er uppvaksin við republikansku hugsjónini. Harumframt metir hann ikki, at fosturtøka er ein rættur, ið er tryggjaður í grundlógini, hann er ímóti serviðgerð av minnilutabólkum og stuðlar hugsjónini um eina avmarkaða samveldisstjórn.

### Stúran vinstrumegin

Á vinstravonginum stúra fólk sum vera man, og tey óttast serliga fyri, at Alito ikki fer at virða rættin til fosturtøku, sum varð staðfestur við einum hægstarættardómi í 1973. Spurningurin um fosturtøku er ein av høvuðsspurningunum í orðaskiftinum um Alito.

- Allir amerikanarar eiga at stúra fyri gongdini, nú tann ytsti høgravongurin, sum forðaði Harriet Miers í at fáa eina hoyring í Senatinum, fegnast um tilnevningina av Alito og streingir á at fáa hann góðkendan í Senatinum. Alito verður tann avgerandi atkvøðan, ið fer at hava stóra ávirkan á okkara frælsi og rættindi, segði demokraturin og fyrrverandi forsetavalevnið John Kerry, ið er senatorur fyri Massachussets. Hann óttaðist fyri, at høgravongurin hevði trýst ein veikan forseta at tilnevna ein dómara, ið fór at polarisera heldur enn at sameina fólkið.

Fjølmiðlar og áhugafelagsskapir hava longu leitað fram tey mál, ið Alito hevur tikið støðu til sum dómari, og tað er ikki hugaligur lesnaður hjá teimum liberalu í USA.

Í einum dómi frá 1992 sigur Alito, at ein gift kvinna skal boða manni sínum frá, áðrenn hon tekur fosturtøku. Alito var tó í minniluta í hesum førinum, og tí varð hendan broytingin ongantíð gjøgnumførd.

Kvinnufelagsskapir vísa á, at hetta hevði skert rættindi hjá kvinnum munandi, og tí stúra tey fyri, at Alito fer at skerja møguleikan fyri fosturtøku, um hann tekur sæti í hægstarætti.

Í einum dómi frá 1996, tá Alito aftur var í minniluta, metti hann, at stjórnin í Washington ikki hevði rætt at regulera søluna av fult-automatiskum vápnum í USA. Hetta var nakað, ið teir einstøku statirnir skuldu taka støðu til. Hesin dómur fær teir felagsskapir, ið arbeiða fyri strangari lógum, ið skerja rættin at bera vápn, upp úr stólinum.

### Skeptiskir senatorar

Hóast almenna hoyringin í Senatinum ikki verður fyrr enn verður tann 9. januar næsta ár, hava fleiri senatorar longu havt innleiðandi fundir við Alito, har teir hava havt møguleika at seta honum spurningar viðvíkjandi hansara tulkingum av grundlógini og øðrum juridiskum spurningum.

Eftir hesar fundir hava fleiri demokratiskir senatorar róð framundir, at tilnevningin av Alito ikki fer at fara stillisliga afturvið borðinum, sum vit sóu herfyri við einum øðrum hægstarættardómara, John Roberts, ið fekk heili 22 atkvøður frá demokratum í Senatinum.

- Tað eru ov nógvir spurningar, ið krevja svar, og ov nógv ivamál, ið standa ósvarað, áðrenn vit kunnu góðkenna hesa tilnevningina, segði demokratiski senatorurin Charles Schumer frá røðarapallinum í Senatinum, tá málið var til viðgerðar.

Leiðarin hjá minnilutanum í Kongressini, John Reid, var meira harðligur í síni meting av Samuel Alito.

- Myndin av Alito gerst alt meira greið, og hon fortelur okkum eisini, hví høgravongurin longu er farin at taka proppin av champagnufløskuni. Alito er ein tann mest konservativi samveldisdómarin, sum finst í hesum landinum, var bersøgna metingin hjá Reid.

### Gleði høgrumegin

Á høgravonginum er gleðin hinvegin stór, nú Bush valdi at fylgja ynskjum teirra í síni næstu tilnevning av dómara til hægstarætt. Víst verður á, at Alito hevur drúgvar royndir sum dómari við ein samveldisdómstól, og tí er hann vælegnaður til hetta starvið. Fleiri senatorar hava longu givið sína støðu til kennar, at teir fara at atkvøða fyri Alito, tá málið kemur fyri í Senatinum.

Tey Hvítu Húsini royna av øllum alvi at marknaðarføra Alito sum ein hóvligan dómara fyri at dempa mótstøðuna frá demokratunum.

Alito hevur longu sjálvur roynt at drigið í land, eftir at skjølini við hansara umsókn frá 1985 vórðu almannakunngjørd. Hann hevur sjálvur yvirfyri fleiri senatorum víst á, at munur er á einari umsókn til eitt starv og tí at vera samveldisdómari.

Dianne Feinstein, demokratur úr California, greiddi frá, at Alito hevði sagt soleiðis á einum fundi teirra millum:

- Eg var ein advokatur, ið søkti eitt starv. Tað var eitt politiskt starv, og hetta var í 1985. Nú eri eg dómari, og eg havi verið dómari í 15 ár, og tað er nakað heilt annað. Eg eri ikki advokatur, og eg lati ikki mínar persónligu meiningar ávirka mítt arbeiði. Mítt starv er at tulka lógina, er Alito siteraður fyri at siga.

Alito hevur eisini givið til kennar, at hann hevur lært nakað síðan 1985, tá umsóknin varð skrivað, og at hann nú hevur størri forstáilsi fyri grundlógartryggjaðum rættindum. Spurningurin er, um hetta er nóg mikið at sannføra tey ivingarsomu um hansara tilnevning.

Republikanski senatorurin Olympia Snowe segði frá einum fundi, hon hevði við Alito.

- Alito segði mær, at hann hevði stóra virðing fyri teimum fordømum, ið hægstirættur hevði sett, men hann ásannaði samstundis, at eingin hægstarættardómari er bundin av fordømum hjá øðrum dómarum, segði Olympia Snowe.

### Óroyndir dómarar

Ein trupulleiki, sum amerikanskir forsetar ofta renna seg í, tá teir skulu tilnevna dómarar til hægstarætt, er tann harða mótstøðan, ið møtir teimum frá mótstøðumonnum í Senatinum.

Harriet Miers var fyrsta valið hjá Bush. Hon hevði ongar royndir sum dómari, og tí høvdu senatorar eitt sera tunt grundarlag at taka støðu út frá uttan tað, at hon hevði arbeitt í umsitingini hjá George Bush í fleiri ár, og tí kundi ein vænta, at hon hevði somu politisku orientering.

Men ivi varð sáddur um hennara konservativu sannføring, og tað var ein av orsøkunum til, at fleiri republikanarar vóru sera skeptiskir viðvíkjandi Miers, og hon tók seg eisini aftur vegna harða mótstøðu úr konservativu leguni.

Tí hava forsetar ofta lyndi til at tilnevna fólk, ið lítlar ella ongar royndir hava sum dómarar. Hetta avvápnar tær kritisku røddirnar, tí tær einki hava grundarlag at meta um tann tilnevnda. Tað var júst hetta, ið Bush royndi við síni tilnevning av Harriet Miers. Hon hevði ikki tikið støðu í nøkrum dómi, og tí kundu demokratarnir ikki finnast at henni vegna hennara fortíð, eins og teir nú gera við Alito.

Eygleiðarar vísa á vandan í, at forsetar ofta velja óroyndar dómarar fyri at sleppa undan einum bardaga í Kongressini, og tað kann vera ein vandi í, at ov óroyndir dómarar manna hægstarætt.



*Samuel Alito verður væntandi næsti dómarin í hægstarætti í USA. Liberalir áhugafelagsskapir og demokratarnir í Senatinum stúra fyri hesi tilnevning, meðan høgravongurin fegnast um Alito. Spurningurin er, hvønn týdning Alito fer at hava fyri samansetingina og javnvágina í hægstarætti*

### Sameining ella spjaðing

Trupulleikin við hesi tilnevningini er eisini, at Alito ikki er ein sameinandi persónur, ið kann fáa breiðan stuðul í Senatinum.

Oddagreinin í International Herald Tribune, ið er eitt blað hjá tí meira vinstravenda New York Times, finst hvassliga at Bush í hesum málinum.

- Bush hevði ein møguleika at geva tekin um, at hann ætlaði sær at føra ein meira sameinandi politikk í seinna skeiðnum sum forseti, og tað hevði hann kunnað gjørt við at tilnevnt ein hóvligan dómara, ið hevði fingið breiðan stuðul frá høgru og vinstru í Senatinum. Hann hevði kunnað signalerað, at hann nú hevur í hyggju at vera inklusivur heldur enn spjaðandi, men ístaðin setur hann tann sjeynda hvíta mannin í starv sum hægstarættardómari, skrivar International Herald Tribune sipandi til kynsbýtið og vantandi minnilutaumboðanina í hægstarætti.

Sum landið liggur nú, kunnu republikanararnir við sínum meiriluta føra Samuel Alito ígjøgnum Senatið, men demokratarnir fara óivað at geva teimum harða mótstøðu í hesum málinum.